# Nýfloygdu pisurnar fóru á flog

**Týskvøldið var pisufundur á Gøtusandi fyri nýklaktu pisunum á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali. Tríggir flokkar vórðu floygdir, og kundu næmingarnir við sorgblídni líta aftur á farnu tvey og trý árini**

PISUFUNDUR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Ilt er at ímynda sær, hvørjir tankar fara ígjøgnum høvdið á teimum nýklaktu pisunum. Men hetta er uttan iva ein løta, sum tey fara at minnast aftur á við gleði*

**Gøtusandur:** Gøtusandur var týskvøldið prýddur við studenta- og HF húgvum saman við føroyskum búnum. Nýklaktir og fegnir studentar og HF´arar gleddust saman við foreldrum, vinum og kenningum og húgvu og prógv.

Talan var um tríggjar flokkar av pisum, sum vórðu floygdar týskvøldið. Tveir studentaflokkar og ein HF-flokkur. So talan er ikki um so stóra fjøld, men gleðin var framvegis eins stór og tá fjøldin hevur verið tað dupulta.

Gleðin aftaná tógvið stríð í fleiri ár. Tað hevur verið strævið og tað hevur kravt nógv av tí einstaka, men lønin aftaná er góð. Prógvið varð latið næmingunum í gjár, mikudag.

## Røður

Sum siður er vóru fleiri røðarar. Gestarøðari var Sólvá Káradóttir Johannesen, og bar hon fram eina serstakliga góða røðu.

Eisini studentarnir og HF´ararnir áttu hvør sín røðara. Fyri studentarnar helt Vígdis Kristiansdóttir úr Klaksvík røðuna, og fyri HF´ararnar var tað Árni Petersen av Kambsdali, sum flutti fram røðu.

Fuglafjarðar Hornorkestur setti dám á hátíðarløtuna við hornblástri.

Fitt av fólki var møtt upp á sandinum. Foreldur, systkin, familja, vinir og kenningar vóru komnir til Gøtu at fegnast saman við studentunum og HF´arunum.

Veðrið var heilt gott. Sjálvt um tað var eitt sindur kølið, tóktist tað ikki at nerva tey mongu veitsluskrýddu, sum stóðu á sandinum. Hetta var teirra løta. Errin fototól blitsaðu uttan íhald, og tey lítlu børnini hugnaðu sær á sandinum.

Sum siður er var myndatøka eisini á skránni. Ein mynd, sum uttan iva verður goymd væl. Um hon kemur at hanga uppi ella um hon verður goymd í eini skuffu, so er og verður hon altíð minni um tey góðu árini á Kambsdali.



*Børnini hugnaðu sær eisini óført á sandinum tá pisufundur var fyri studentar og HF´arar av Kambsdali*



*Árni Petersen av Kambsdali var røðari hjá HF´arunum*



*Vígdis Kristiansdóttir úr Klaksvík helt røðuna hjá studentunum á Gøtusandi týskvøldið*



# Politisk togtogan um málsøki

**Almannaráðið keypti fyrr í ár hús í Sandavági, sum ætlanin var skuldi brúkast sum eitt sambýli til sinnisveik. Men eftir politiska togtogan á økinum er komið fram, at málsøkið hoyrir ikki undir almannamál, men undir málsøkið hjá Bill Justinussen. Hetta merkir, at húsini nú helst ikki verða brúkt til sinnisveik, men møguliga heldur til menningartarnað ella heilaskadd**

RUMBUL
*Ingrid Bjarnastein*



*Hetta húsið keypti Almannaráðið fyrr í ár. Nú er komið undan kavi, at málsøkið, sum húsini skuldu nýtast til, hoyra undir trivnaðarmál*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavágur:** Í januar í ár keypti Almannaráðið hús í Sandavági, sum skuldu brúkast til sambýlið til sinnisveik.

Nú er komið fram, at sosial-psykiatriin als ikki hoyrir undir almannamál, men undir trivnaðarmál hjá Bill Justinussen. So málsøkið hoyrir undir trivnaðarmálaráðharran, meðan húsini hoyra undir almannamálaráðharran.

Hetta er komið undan kavi eftir nógv politiska togtogan á økinum.

– Eg skal ásanna, at tað hevur verið ein togtogan millum tjóðveldisflokkin og miðflokkin um hesi økini. Tá málini av fyrstan tíð vóru býtt millum sundur í almannamál og trivnaðarmál vóru nøkur grásonuøki. Millum annað heilsuróktarskipanin, sosialpsykiatriin og vejingarheim til langtíðarsjúklingar, greiðir Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum frá.

## Uppá pláss

Ikki fyrr enn mánadagin komu hetta grásonuøkið, sum eitur sosialpsykiatri uppá pláss, og tá varð avgjørt, at økið hoyrir undir trivnaðarmál hjá Bill Justinussen.

Tað vil siga, at nú kann tað væl vera, at húsini als ikki fara at verða brúkt til sambýli til sinnisveik, men heldur okkurt heilt annað, sum hoyrir undir landsstýrismannin í heilsumálum.

– Psykiatriski depilin gjørdi greitt, at tað var ikki tørvur á einum sambýlið til sinnisveik, tí tað eru ikki nóg nógvir fastbúgvandi sjúklingar til eitt slíkt heim. Og tað kann væl henda seg, at eg fari at taka hetta til eftirtektar, og so heldur gera húsini til eitt sambýli til menningartarnað ella heilaskadd, sigur Páll á Reynatúgvu.

Økið er nú politiskt flutt, og nú skal alt tað formliga uppá pláss.

– Eg haldi bara, at tað er gott, at vit hava fingið ein enda á hesum. Nú kunnu vit fara til arbeiðis, óansæð, hvør umsitur økið, sigur landsstýrismaðurin at enda.




W W W . S O S I A L U R I N . F O